GÍ-NSÍ:

# Bert sigurin telir

**Skal GÍ hava glið á aftur, er neyðugt við einum sigri. Tað er tað hinvegin eisini hjá NSÍ, sum tykist hava fingið nakað av ferð á seinastu umførini**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Krzystof Popczynski hevur allar mans tøkar, tá hann skal seta liðið til dystin móti NSÍ*

Tað plagar vanliga at ganga harðliga fyri seg, tá GÍ og NSÍ takast, og eingin orsøk er at halda, at hetta verður øðrvísi sunnudagin. GÍ hevði eina flúgvandi byrjan upp á árið, men eftir samanlagt átta sigrar á rað, er liðið nú follið nakað niður, og skal talan verða um at hanga í oddinum, er ein sigur kravið sunnudagin.

Tað er tað eisini hjá runavíkingum, sum hinvegin hava havt eina uppgangandi formkurvu seinastu dystirnar, har tað eisini hevur eydnast liðnum at stríða seg í bólkin av liðum, sum eru beint undir oddinum.

**Skerdir runavíkingar**

Tí er einki at ivast í, at báðir partar leggja nógv fyri, og úr Gøtu eru boðini, at allir mans eru tøkir.

– Vit hava ein hóp upp á 22 mans, og teir kunnu allir spæla, so venjarin hevur ein positivan trupulleika, sigur Pauli Jarnskor, sum aftur í ár er næsti maðurin hjá Krzystof Popczynski í Gøtu.

Og hann dylir ikki fyri, at farið verður eftir stigunum.

– Tað var kanska væntandi, at vit fyrr ella seinni fóru at fáa ein lítlan niðurtúr, men so mugu vit bara royna at venda hesum. Og skulu vit uppeftir, so er ein sigur kravið, heldur hann.

Í Runavík stendur ikki heilt so væl til við fólkinum. Messisa Perreira og Alexandar Jovevic eru báðir úti við skaða, og roknað verður ikki við, at teir eru tøkir enn. Tað er Helgi L. Petersen heldur ikki, eftir at hann fekk triðja gula kortið í dystinum móti KÍ.

Tó verður roknað við, at runavíkingar hava mann at seta í mans stað. Seinast byrjaðu eitt nú Gert Langgaard uttanfyri, eins og Jústines Rasmussen gjørdi tað, og teir tykjast uppløgd alternativ til tøku plássini. Tað sama er Súni Fríði Barbá kanska, eftir at hann nú er tøkur hjá runavíkingunum, og so er spurningurin, hvørt máltevið, sum annars hevur verið heldur rustað seinastu tvey árini, aftur er avpussað.

## 1. deild menn

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Skála | 5 | 4 - 1 - 0 | 13 | 4 | 9 | 13 |
| 2 HB | 5 | 3 - 1 - 1 | 12 | 5 | 7 | 10 |
| 3 B36 | 5 | 2 - 2 - 1 | 10 | 5 | 5 | 8 |
| 4 VB | 5 | 2 - 2 - 1 | 7 | 4 | 3 | 8 |
| 5 NSÍ | 5 | 2 - 2 - 1 | 10 | 9 | 1 | 8 |
| 6 GÍ | 5 | 2 - 1 - 2 | 7 | 9 | -2 | 7 |
| 7 KÍ | 5 | 1 - 3 - 1 | 7 | 8 | -1 | 6 |
| 8 EB/Streymur | 5 | 1 - 2 - 2 | 5 | 9 | -4 | 5 |
| 9 ÍF | 5 | 1 - 0 - 4 | 10 | 14 | -4 | 3 |
| 10 B68 | 5 | 0 - 0 - 5 | 3 | 17 | -14 | 0 |

## 2. deild menn

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 5 | 4 - 0 - 1 | 16 | 8 | 8 | 12 |
| 2 Royn | 5 | 4 - 0 - 1 | 16 | 8 | 8 | 12 |
| 3 AB | 5 | 3 - 1 - 1 | 10 | 7 | 3 | 10 |
| 4 FSV | 5 | 3 - 0 - 2 | 18 | 9 | 9 | 9 |
| 5 Sumba | 5 | 3 - 0 - 2 | 10 | 9 | 1 | 9 |
| 6 B71 | 5 | 3 - 0 - 2 | 12 | 15 | -3 | 9 |
| 7 B36 | 5 | 2 - 0 - 3 | 8 | 13 | -5 | 6 |
| 8 LÍF | 5 | 1 - 1 - 3 | 7 | 12 | -5 | 4 |
| 9 KÍ | 5 | 0 - 1 - 4 | 8 | 14 | -6 | 1 |
| 10 VB | 5 | 0 - 1 - 4 | 5 | 15 | -10 | 1 |

EB/Streymur-ÍF:

# Botnslag á Eiði

**Serliga hjá fuglfirðingum tykist ein sigur sunnudagin at hava alstóran týdning**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað lætti nakað um trýstið hjá EB/Streymi, tá teir seinasta vikuskifti vunnu ein harðliga tiltrongdan sigur í Sarpugerði. At sigurin so kanska ikki var heilt so uppiborin, sum tølin kundu bent á, hevur helst minni at siga í so máta, og fáast trý stig til høldar sunnudagin, eru teir á felagsliðnum helst eisini líkaglaðir um, hvussu hesi eru komin.

Hesaferð er tað ÍF, sum kemur á vitjan, og júst ÍF er liðið, sum EB/Streymur dystast við, í royndunum at sleppa heilt burtur frá niðurflytingarstrikuni.

**Fleiri broytingar**

Við einum sigri sunnudagin kann fjarstøðan her gerast fimm stig, og tað er einki at ivast í, at tað er hesum, sum miðað verður eftir.

Eins og seinasta vikuskifti, so noyðist Piotr Krakowski at smyrja seg við, at hann ikki fær valt millum allar leikararnar til dystin. Nico Dogaru er framvegis á skaðalistanum. Marni Djurhuus fekk skaða í dystinum í Gøtu, har Johan á Stongum eisini fekk reyða kortið, so teimum báðum kann heldur ikki roknast við. Eisini tykist tað ivasamt, hvørt Jákup Martin Joensen er tøkur at spæla. Hann hevur drigist við skaða seinasta mánaðin, men hann hevur tó treiskast hvørja ferð, og so er spurningurin, um tað eisini verður støðan sunnudagin.

Hjá ÍF stóð heilt illa til við fólki seinasta vikuskifti, men hesaferð tykist støðan nakað bjartari í so máta.

Magni og Bárður á Lakjuni vóru ikki við í Vági, men teir eru báðir tøkir hesaferð. Tað sama er Fritleif í Lambanum, eftir at hann hevði leikbann til tann dystin.

Og so er spurningurin, hvørt Sigfriður Clementsen megnar at blanda kortini somikið væl, at tað røkkur til sigur á EB/Streymi. Í øllum førum hevur ÍF illa ráð at tapa dystin, soleiðis sum talvan sær út.

# Fáir javnleikir

Stendur tað til hagtølini, so eru sannlíkindini fyri javnleikum lítil sunnudagin. Talvan her sýnir, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst seinastu tíggju árini, og tað er merkisvert, hvussu fáir javnleikirnir hava verið í tali. Til samans fevnir yvirlitið um 31 dystir, og av hesum eru bert tríggir endaðir javnir, so tað liggur tann vegin, at fimm vinnarar skulu finnast.

Og av hesum tykist HB hava greiðastu hagtølini. Bara tvær ferðir seinastu tíggju árini hevur tað eydnast B36 at taka stigini, tá teir hava átt heimavøll, og tað er helst ein staðfesting, sum tey í árstalsfelagnum fegin vilja broyta. Javnleikur var úrslitið, tá EB/-Streymur fyri higartil einastu ferð tók ímóti ÍF í bestu deildini, og annars tykjast heimaliðini hava greiðan fyrimun – Í øllum førum, tá vit tosa um hagtøl. Hvat úrslitið verður sunnudagin, er so nakað heilt annað.

**-jm**

| | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | 94 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36-HB | 0-2 | 1-2 | 1-0 | 1-2 | 0-2 | 0-1 | 2-3 | 2-0 | 0-5 | 1-3 | 2-0-8 | 8-20 |
| GÍ-NSÍ | 1-1 | 0-2 | 0-1 | 1-0 | 1-3 | 5-1 | 2-0 | - | 5-1 | 2-1 | 5-1-3 | 17-10 |
| B68-VB | 2-0 | 4-0 | 1-4 | 1-2 | 0-0 | 2-1 | 0-1 | 3-1 | 3-0 | - | 5-1-3 | 16-9 |
| KÍ-Skála | 7-0 | 4-0 | - | - | - | - | - | - | - | - | 2-0-0 | 11-0 |
| EB/S-ÍF | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 3-3 | 0-1-0 | 3-3 |

Vikuskifti

Nr. 105 • leygardagur • 5. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Tá ið málini verða sett



Tinghellan á s. 6–7



# Norðoystevnan – »okkara ólavsøka«

Fyrsta norðoyastevnan varð hildin í 1936. Orsøkin var, at menn vildu, at okkara sjófólk skuldu uppliva eina stevnu – eina »fest« – nú teir vóru komnir aftur av Suðurlandinum – og áðrenn teir fóru til Grønlands. Tí fáur av teimum mundi fara at verða heima á ólavsøku



*Jógvan E. Ósá*

Norðoyggjar og Klaksvíkin hava altíð verið nær knýtt at sjóvinnuni – og nógvir av av okkara monnum vóru burtur alt summarið.

Men nú skuldu teir sleppa at uppliva eina lokala ólavsøku – í Klaksvík.

Tá ið eg fyri nakað nógvum árum síðan var í Íslandi – í Húsavík – fyrsta vikuskifti í juni – upplivdi eg, at íslendingar hildu »sjómannadag« – fyrsta leygardag í juni.

Tá koma øll skip – sum kunnu tað – inn at halda veitslu – tí tað er »teirra« dagur – meira enn 17. juni, tá ið tjóðardagur íslendinga er.

Og tað var stuttligt at uppliva hettar. Íslendingar smæðast ikki burtur, tá ið tað kemur til veitslulag – og dagurin var sera áhugaverdur og stuttligur.

Har vóru kappingar av ymiskum slag – kapppróður, kappsigling á vatnscootara (var tað nakað vit skuldu roynt??), fótbóltur osv. – og so var veitsla um kvøldið – og tað var veitsla við lýt.

Tá ið seinni segði pápa mínum frá hesum, segði hann, at hann helt, at klaksvíkingar – teir ið skipaðu fyri fyrstu norðoyastevnuni – høvdu fingið hettar hugskotið júst úr Íslandi – frá »sjómannadegnum« – og at tað skuldi verða fyrsta vikuskiftið í juni á hvørjum ári.

Um norðoyastevnuna skrivaði Hákun Djurhuus, sáli, ið var við til at skipa fyri fyrstu norðoyastevnu, í Norðlýsinum:

*»Summar og stevnur hoyra saman. Summarsins mjúka lot, sveipandi mjørkatám og tær gróðrardimmu líðir, døggtungar í morgunroðanum er kransurin, ið náttúran hevur gjørt stevnum frá fyrndini av, og í mannabørmum hevur hon eisini lagt tráan, ið føst er bundin av hesum summarins vakurleikum, og kann njóta teir.*

*Norðoyastevnan er ein slík stevna, ið grundar á forfedranna kappingarstevnum, har teir komu saman til ítrótt og leik, hvar ætt hitti ætt og vinir funnust.*

*Ætlanin er at gera hana til summarstevnu eisini fyri allar teir Føroya synir, ið mugu rýma frá tí føroyska summarinum. Gera hana til eina hugnaliga løtu áðrenn skilnaðin, eina løtu, ið minnst kann vera á, tá sjóbardir menn, troyttir av sleipi, venda huganum heim aftur at heimlandinum, og vónandi kemur hetta at eydnast«.*

Ta fyrstu norðoyastevnu var keðiligt veður norðoyastevnuaftan – við regni og vindi – men norðoyastevnudag var gott veður við sólskini. Og KÍ, sum altíð tabti ímóti TB, spældi ímóti TB hendan dag og vann 2-1. So tað var dagur í viku.

Pápi mín, ið doyði í 1999, segði, at hann minnist ta fyrstu norðoyastevnuna sum rættuliga strævna. Hann róði kapp norðoyastevnuaftan og spældi á 1. liði hjá KÍ norðoyastevnudag. Men tá dysturin var liðugur, var stuttligt at vera KÍ-ari og klaksvíksingur.

Tað verður nógv gjørt burtur úr ólavsøkuni – og alt gott um tað. Men hvat hava teir meira enn vit?? Jú, teir hava ein bisp í fínasta skrúð – eitt løgting, ið verður sett og Frelsunarherin á Vaglinum. Eg minnist onki meira. Basarin hjá nonnunum er, so vítt eg veit ikki meira – so hvat er alt hettar reypið?? Áh, jú, so hava teir steypuni, ið skulu handast – og tað tekur »100 ár«. Tað mugu teir gjarna eiga.

Nei. Lat teir eiga ólavsøkuna. Bara eg sleppi at eiga norðoyastevnuna – og norðoyingar saman við mær. Og gestir skulu verða vælkomnir. Bara teir ikki taka hana frá okkum.

Eg gleði meg til at halda norðoyastevnu 2004. Gerð tú ikki tað?? Hon er næst eftir jólaaftan.

Góða norðoyastevnu!